## Fyrilestur um íslendska búskapin

Týsdagin 24. juni klokkan 17 heldur Ásgeir Jónsson, leiðandi hagfrøðingur hjá Kaupthing í Reykjavík, fyrilestur í Aðalkonsuláti Íslands í Fútastovu. Evnið er peningaviðurskifti Íslands. Fyrilesturin verður hildin á enskum undir heitinum »Is Iceland Melting?«, ella »Er Ísland farið at bráðna?« Øll eru vælkomin, upplýsir íslendska aðalkonsulátið.



## 19 nýggir lærarar

Klokkan tvey seinnapartin í dag var hátíðarhald í høllini á Føroya Læraraskúla. 19 læraralesandi – fjúrtan konufólk og fimm mannfólk - hava seinastu dagarnar verið til síðstu próvtøkurnar, og í dag vórðu prógvini handað. Eingin orsøk er at stúra fyri at fáa starv hjá nýggju lærarunum. Skúlar hava sett seg í sambandi við nýggju lærararnar og bjóðað teimum starv, og í bløðunum hava fleiri enn 80 lærarastørv staðið leys at søkja. Freistin at søkja inn til lærara- og pedagoglestur er nú mánadagin. Nú fer lesturin at verða skipaður á BA stigi. Í MMR verður arbeitt við at fyrireika nýggja lóggávu, og í tí sambandinum verður møguleiki fyri, at tey, ið hava tikið BA prógv sum lærarar, eisini kunnu halda fram at lesa til MA á samanlagda Fróðskaparsetri Føroya.

# 60 millióna íløga í ungdómin



*Neyvan nakrantíð hevur býráðssalurin verður so stúgvaður av fólki, sum hann var í gjárkvøldið*

**Tórshavnar Býráð samtykti á fundi í gjár at byggja fimleikahøll við norðara enda á Tórsvølli. Samlaði kostnaðurin liggur beint undir 60 milliónir krónur, og er her talan um størstu íløgu í ítróttin, sum Tórshavnar Kommuna nakrantíð hevur gjørt**

FIMLEIKAHØLL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Hannis Wardum*

- Eg havi ongantíð upplivað so nógvar áhoyrarar til ein býráðsfund.

Tað sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri, um býráðsfundin í gjárkvøldið. Og tað var heilt týðiligt hvat tað var fyri mál, ið upptók fólk. Og umsitingin hevur havt ein sterkan varhuga um, at stórur áhugi var fyri málinum, tí stólar vóru settir upp til eini 60-65 fólk – umframt at fólk stóðu heilt út í tún.

Stóra spenningsmálið var nýggja fimleikahøllin, sum býráðið leingi hevur viðgjørt, og sum í gjárkvøldið skuldi fáa sína endaligu lagnu.

Og tað vóru jubilsenur, tá atkvøðugreiðslan var av og málið endaliga samtykt við 10 atkvøðum fyri, tveimum blonkum og ongari ímóti.

- Tað eru fólk, sum halda okkum vera ør í býráðnum, at brúka so nógvan pening til hesa verkætlanina, men eg haldi tvørtur ímóti, at hetta er ein fantastisk íløga í ungdómin. Her skapa vit teir bestu karmar og royndir vísa, at betri karmarnir eru, fleiri fólk íðka ítrótt, sigur Heðin Mortensen.

Talan verður um tríggjar hallir, tvær til rútmiskan fimleik og ein til amboðsfimleik. Hallirnar eru tó so snilt innrættaðar, at veggirnir kunnu flytast, so tú kanst fáa tvær ella eina stóra høll.

- Hetta verður ein ógvuliga flott høll, sum – ikki minst týdningarmikið – lýkur øll altjóða krøv og støddir, sigur Heðin Mortensen.

### Hava bíðað leingi

Avgerðin um at byggja eina nýggja høll til fimleikin kemur væl við hjá fimleikarunum. Tað er ein sannroynd, at fimleikurin í Føroyum er á veg fram, tað vísa ikki minst úrslitini, sum rytm-



*Sjálvt tey fýrbeintu vóru spent um úrslitið*